## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av suðri og um kvøldið regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og sirm ella mjørki. Um kvøldið nakað minni vindur av útsynningi og regn av og á. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og regn eitt skifti. Um kvøldið minni vindur. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, týsdagin upp í stívt andøvsgul av eystri. Lítið ella einki avfall og hitin millum 9 og 13 stig.

# Klárur til Zidane

**Zinedine Zidane verður av flestu fótbóltsserfrøðingum mettur millum teir allar størstu í alheims fótbóltssøguni. Ja, heilt á hædd við bæði Pelé og Maradona, vilja summi vera við. Eftir ein steðg á landslið, hevur hann nú meldað seg tøkan aftur hjá bláa stórveldinum, og leygardagin verður tað helst Fróði Benjaminsen, sum skal ansa Zizou í hansara veruliga come-back dysti fyri landsliðið**



*Størri enn tað sama verður uppgávan neyvan. Fróði Benjaminsen er helst maðurin, sum leygardagin skal ansa eftir heimsins besta fótbóltsspælara - Zinedine Zidane*

HEIMSINS BESTI

*Jákup Mørk/ Álvur Haraldsen*

**Bethune, Frakland:** Á føroyska liðnum var Fróði Benjaminsen leikbannaður í 0-3 tapinum fyri Kypros, men hann er nú aftur partur av hópinum. Og tað man valda lítil ivi um, at hann aftur kemur beint inn millum teir fyrstu ellivu, og ivaleyst verður tað eisini hann, sum vær møtumiklu uppgávuna at standa yvir fyri einum av bestu spælarunum í søguni.

- Tú veit jú ikki, um tú sleppur at byrja inni, men sjálvandi vóni eg, at tað verður støðan, segði Fróði, tá vit eftir fyrstu venjingina hjá landsliðnum fingu orðið á hann.

Og tað verður kanska eisini tín lutur at standa yvir fyri einum av bestu spælarunum í fótbóltssøguni. Er tað nakað, sum mann hugsar serliga nógv um undan einum slíkum dysti.

- Verður tað so, so verður tað sjálvandi ein stór upplivilng. Tú hugsar kanska eisini serliga nógv um tað undan dystinum, men tá dómarin so hevur sett dystin ígongd, so eru teir tankarnir burtur. Tá roynir tú bara at gera tað so gott, sum tú á nakran hátt kanst gera tað.

*Og tú hugsar ikki um, at tað kanska kann kosta Zidane ella Real Madrid einar 50 milliónir, um tú gert eitt ov ógvusligt fríspark?*

- Nei. Eg ætli mær so ikki at standa sum ein rukka á vøllinum. So man má gera tað, sum er neyðugt, stórflennir Fróði.

Hann heldur annars, at lagið í hópinum er gott undan stóru uppgávuni, og at menn eisini sálarliga eru klárir til uppgávuna.

- Ikki minst haldi eg, at liðið vil reisa seg eftir keðiliga úrslitið móti Kypros. Spælið var kanska ikki so galið tá, men úrslitið var alt annað enn gott.

*Og hvat er so eitt gott úrslit hesaferð?*

- Tað er sjálvandi trupult at siga. Men vit hava so ein 0-0 javnleik, tá vit fara á vøllin, og kundu vit hildið fast um hann, so vildi tað verið fantastiskt, segði Fróði Benjaminsen at enda.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 30 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 30 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 30 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 30 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 9 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 994 hPa. yvir Íslandi fer í landnyrðing og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1003 hPa. yvir Skotlandi fer í landnyrðing, eysturum Føroyar.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og hitabrúgvin haðani kemur hendavegin og verður yvir Føroyum fríggjakvøldið.

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 31/8 kl. 06[00]– 1/9. 06[00]. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 31/8 kl. 06[00]– 1/9 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 129,2 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

1. september Mánin longst frá jørðini
3. september Tendring

Kelda. Álmanakkin 2005

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmannasundi | | Mykinesfirði | | Nólsoyarfirði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvannasundi | | Fugloyarfirði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 2. Sept | 06.44 | 19.03 | 05.44 | 18.03 | 05.59 | 18.18 | 08.44 | 21.03 | 09.44 | 22.03 | 04.59 | 17.18 | 03.59 | 16.18 | 06.59 | 19.18 | 07.59 | 20.18 | 06.29 | 18.48 | 07.44 | 20.03 |
| 3. Sept | 07.21 | 19.40 | 06.21 | 18.40 | 06.36 | 18.55 | 09.21 | 21.40 | 10.21 | 22.40 | 05.36 | 17.55 | 04.36 | 16.55 | 07.36 | 19.55 | 08.36 | 20.55 | 07.06 | 19.25 | 08.21 | 20.40 |
| 4. Sept | 07.57 | 20.15 | 06.57 | 19.15 | 07.12 | 19.30 | 09.57 | 22.15 | 10.57 | 23.15 | 06.12 | 18.30 | 05.12 | 17.30 | 08.12 | 20.30 | 09.12 | 21.30 | 07.42 | 20.00 | 08.57 | 21.15 |
| 5. Sept | 08.32 | 20.49 | 07.32 | 19.49 | 07.47 | 20.04 | 10.32 | 22.49 | 11.32 | 23.49 | 06.47 | 19.04 | 05.47 | 18.04 | 08.47 | 21.04 | 09.47 | 22.04 | 08.17 | 20.34 | 09.32 | 21.49 |
| 6. Sept | 09.06 | 21.24 | 08.06 | 20.24 | 08.21 | 20.39 | 11.06 | 23.24 | - | 12.06 | 07.21 | 19.39 | 06.21 | 18.39 | 09.21 | 21.39 | 10.21 | 22.39 | 08.51 | 21.09 | 10.06 | 22.24 |

5 707265 100050 >